B36-B68:

# Tey næstbestu aftur i Havn

**Annað vikuskiftið á rað er dystur millum nummar tvey og trý í Gundadali**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Eftir mista oddasessin í farnu viku er einki at ivast í, at teir í B36 sum skjótast vilja hava gongd á aftur stigasavnanina, soleiðis at tað skal bera til at fylgja við grannunum, sum nú hava lagt seg á odda.

Og tað er heldur einki at ivast í, at B36 skal reisa seg, um teir skulu hava stigini móti B68. Toftamonnum vórðu tað ikki so nógv, sum roknaðu við undan kappingarárinum, men stigatalvan sýnir, at liðið í løtuni er á triðja plássinum í kappingini. Spælið hevur kanska ikki alla tíðina verið so framrættað, sum vit áður hava sæð tað, men verjan og málverjin hava verið sum livandi skansar, og í teimum 11 dystunum, sum liðið hevur spælt, eru bert sjey mál farin ígjøgnum.

### Eitt bann í part

Og liðini bæði kunnu sunnudagin fara á vøllin við nøkrum, sum líkist sterkastu uppstilling. Hjá B36 er einasta fráveran helst Allan Mørkøre, sum fekk reytt kort seinasta sunnudag, og tað merkir allarhelst, at Ion Geolgau fer at umskipa verjuna hjá sær nakað. Mest nærliggjandi tykist her vera, at Fróði Clementsen verður settur inn í miðverjuna, og at Rúni Elttør fer á vinstra bakkin, sum hann var ætlaður til, meðan Kenneth Jacobsen so verður fluttur yvirum.

Hetta er tó sjálvandi treytað av, at Pól Thorsteinsson verður førur fyri at spæla við sunnudagin. Landsliðsleikarin hevur seinastu tíðina drigist við eina eyma hælsinu, og hesa vikuna hevur hann als ikki tikið lut í venjingunum hjá B36, men einamest hevur hetta verið gjørt, tí leikarin skuldi hava møguleika at hvíla seg.

Hjá toftamonnum var Fróði Benjaminsen ikki við seinast, men hann hevur so sitið sítt leikbann av sær. Tað merkir uttan iva, at hann aftur verður við stýrisvølin á miðvøllinum, men hinvegin má B68 so vera Jóhan Petur Poulsen fyriuttan, nú hann hevur leikbann.

Hvussu leikætlanin hjá liðunum báðum verður, bar ikki til at fáa at vita, men ivaleyst heldur B68 fast í, at verjuskipanin skal vera góð, fyri síðani at dúva upp á kontra.



*Arnbjørn Danielsen, sum nú er aftur í barndómsfelagnum, skal fyri aðru ferð í ár royna at knógva fyrrverandi liðfeløgunum úr B36*

Skála-HB:

# Oddasessurin skal haldast

**HB skal verja oddasessin, men Skála skal hinvegin hava stig her og nú, skulu teir nærkast kappingarneytunum í botnstríðnum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað er einki at siga til, um fótbóltshýrurin í HB er í toppi. Felagið vann seg seinasta vikuskiftið á aftur oddasessin í bestu mansdeildini, og á pappírinum tykist tað eisini, sum hevur HB bestu skránna í seinastu sjey umførunum.

Tí er HB helst í løtuni fremsti favorittum at vinna gullmerkini og tilhoyrandi milliónina, og einki er at ivast í, at tað er teir, sum eru favorittarnir á Skála sunnudagin.

Skála hevur nevnliga alt árið hildið til í botninum. Eittans stig í ellivu dystum er heldur ikki tað, sum skal til, um nøkur bjarging skal finnast, og nú er netið av álvara farið at stramma. Tí er einki at ivast í, at Skála má og skal hava stig nú, um nøkur bjarging skal finnast.

Einki er at ivast í, at uppgávan hjá Skála verður trupul, og hon gerst neyvan minni trupul av, at Alexander Jovevic sá reytt á Toftum fyri viku síðani, og tí ikki kann vera partur av hópinum. Hinvegin hevur Skála aftur fingið Arnhold Berg og Julian Florescu aftur, eftir at teir báðir høvdu leikbann seinast. Tað hevði Agnar Højgaard eisini, men umstøðurnar hjá honum at venja fleiri ferðir um vikuna eru ikki av teimum bestu, og tí tykist tað vera so, at hann fyribils hevur leikt sín seinasta dyst hetta kappingarárið.

Hjá HB tykist støðan hinvegin vera heilt góð viðvíkjandi manningarspurninginum. Karsten From er sjálvsagt ikki longur í hópinum, men í aðrar mátar eru at kalla allir mans tøkir. Kári Nielsen, sum var ein av fleiri við drúgvum skaðasteðgum er eisini byrjaður at venja, og møguleiki er fyri, at hann verður við í hópinum sunnudagin, tó at tað neyvan verður millum teir fyrstu ellivu.

Og trý stig til HB eru kravið. Tað heldur teir í øllum førum tvey stig undan argastu kappingarneytunum, og so munnu teir reyð/svørtu leggja vertin á, at ein sigur her vil gera lagnuna hjá Skála enn meira trupla.



*Tað er toppur móti botni, tá HB vitjar á Skála sunnudagin*

### Støðan, 1. deild menn

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 11 | 7 - 3 - 1 | 26 | 13 | 13 | 24 |
| 2 B36 | 11 | 7 - 1 - 3 | 24 | 11 | 13 | 22 |
| 3 B68 | 11 | 5 - 5 - 1 | 13 | 7 | 6 | 20 |
| 4 NSÍ | 11 | 5 - 4 - 2 | 20 | 10 | 10 | 19 |
| 5 KÍ | 11 | 5 - 2 - 4 | 11 | 16 | -5 | 17 |
| 6 EB/Streymur | 11 | 4 - 4 - 3 | 19 | 19 | 0 | 16 |
| 7 GÍ | 11 | 3 - 4 - 4 | 14 | 17 | -3 | 13 |
| 8 VB | 11 | 2 - 3 - 6 | 11 | 20 | -9 | 9 |
| 9 FS V | 11 | 2 - 2 - 7 | 14 | 25 | -11 | 8 |
| 10 Skála | 11 | 1 - 0 - 10 | 6 | 20 | -14 | 3 |

### Støðan, 2. deild menn

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 9 | 7 - 2 - 0 | 19 | 6 | 13 | 23 |
| 2 Sumba | 9 | 5 - 3 - 1 | 21 | 5 | 16 | 18 |
| 3 TB | 9 | 5 - 1 - 3 | 21 | 14 | 7 | 16 |
| 4 VB | 9 | 5 - 1 - 3 | 19 | 12 | 7 | 16 |
| 5 AB | 9 | 3 - 4 - 2 | 17 | 12 | 5 | 13 |
| 6 KÍ | 9 | 4 - 1 - 4 | 16 | 27 | -11 | 13 |
| 7 LÍF | 9 | 3 - 1 - 5 | 11 | 21 | -10 | 10 |
| 8 B36 | 9 | 2 - 3 - 4 | 14 | 13 | 1 | 9 |
| 9 B71 | 9 | 2 - 1 - 6 | 13 | 13 | 0 | 7 |
| 10 B68 | 9 | 0 - 1 - 8 | 4 | 32 | -28 | 1 |



EB/Streymur-KÍ:

# EB/S miðjar eftir fimta plássinum

**Fyri fyrstu ferð fara heimaáskoðararnir hjá KÍ at síggja Jacob Bymar í týdningarmiklari uppgerð**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

EB/Streymur verður gestur í Klaksvík í morgin. Í fjør vann KÍ 3-1 á heimavølli ímóti EB/Streymi, men tann uppgerðin er ivaleyst nógv meiri kámað í huganum á fótbóltsspentu klaksvíkingunum, enn tann í fyrraárið, tá ið teir í Sundalagnum í – sum klaksvíkingar minnast tað – skandaludystinum á norðoyastevnu vunnu 4-0.

Gestirnir í Klaksvík í morgin hava higartil staðið seg betri, enn teir nakrantíð áður hava gjørt í bestu deildini. Teir eru á sætta plássinum, og um teir fáa fult í morgin, so fara teir at lyfta seg upp um KÍ, sum í løtuni er á fimta plássinum.

– Vit halda okkum hava nógv at spæla fyri. At tað síðsta sunnudag eydnaðist fyri aðru ferð í ár at vinna á B36, sum var oddalið, sigur okkum, at vit hava møguleika ímóti øllum hinum liðunum eisini. Nú hava vit møguleika at enda omanfyri miðstrikuna, og tí møguleikanum ætla vit at arbeiða fyri, siga teir í EB/Streymi.

Sorin Anghel hevur havt smávegir trupulleikar í viktuni, men tað verður heilt víst roknað við, at hann verður í álopinum í morgin. Allir hinir spælararnir eru tøkir, eisini Marni Djurhuus, sum var leikbannaður, tá ið B36 var á Mølini.

### Grind og Noreg

Ein tann uppgerðin, sum klaksvíkingar hava verið best nøgdir við í ár, var tann, tá ið teir í triðja umfarinum vunnu 1-0 á Mølini á Eiði. Fyri KÍ kendist tað sum stórt vónbrot, at teir ikki megnaðu at vinna í Vági. Harvið má roknast við, at møguleikin fyri at vera við í stríðnum um gullið og Europa Cup plássini næsta ár er burtur.

Í gjár nýttu nógvir norðoyingar tíðina til at taka grind upp. Samstundis varð dúgliga prátað um Europa Cup ferðina hjá KÍ til Noregs í næstu viku. Farið verður týskvøldið, dysturin í Molde verður hóskvøldið, og teir koma aftur fríggjamorgunin.

Innímillum grindina og ferðina til Noregs skulu teir í Klaksvík savna hugsanirnar um stríðið ímóti EB/Streymi í morgin. Tá fer nýggi álopsspælarin, Jacob Bymar, at spæla fyri fyrstu ferð í Klaksvík. Hann hevur verið við í venjingardysti í Leirvík, í ólavsøkudysti ímóti HB og í landskappingardysti í Vági, og nú skal hann altso royna seg í landskappingardysti á heimavølli.

Allir spælararnir, sum vóru við í Vági, eru tøkir. Í hesi vikuni hevur Allan Joensen, sum leingi hevur verið skaðaplágaður, og sum hevur vant millum lítið og einki í tveir mánaðir, aftur verið á vøllinum.



*Ein tann uppgerðin, sum klaksvíkingar hava verið best nøgdir við í ár, var tann, tá ið teir í triðja umfarinum vunnu 1-0 á Mølini á Eiði*

FSV-VB:

# Spæla fyri at sleppa undan svarta Peri

**Ein av útlendingunum hjá VB verður uttanfyri, og hjá FS Vágum eru fleiri spælarar ivasamir undan tí, sum báðir partar síggja sum lyklauppgerð**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Teir eru samdir um tað í Vági og í Vágum. Tann teirra, sum megnar at vinna innanhýsis uppgerðina í Miðvági í morgin, fer eftir átjan umfør at hava góðan møguleika fyri at sleppa undan níggjunda plássinum og harvið longdum leikári og hóttanini av niðurflyting.

Hjá vágbingum eru allir spælararnir tøkir. Eisini danski álopsmaðurin, Brian Andresen, sum orsaka av skaði ikki var førur fyri at spæla ímóti KÍ. Eingin ivi er um, at hann verður ímillum teir fyrstu ellivu í morgin. At hann verður við, ber við sær, at onkur annar av útlendsku VB spælarunum verður uttanfyri. Ásetingarnar siga, at hámarkstalið fyri útlendingar er fýra. Einki forðar fyri, at ein fimti útlendingur verður á VB beinkinum, og at hann verður skiftur inn fyri ein annan útlending.

– Tað hevur altíð verið torført hjá okkum at spæla í Vágum. Síðsta sunnudag fluttu vit eitt pláss upp, og vit høvdu verið stak væl nøgdir, um tað sunnudagin hevði eydnast hjá okkum at varðveitt plássið, siga teir í Vági. Tað vil við øðrum orðum siga, at teir høvdu verið nøgdir við eitt stig í morgin.

### Fleiri ivasamir

Vágamenn vunnu í triðja umfarinum 3-2 í Vági. Tað átti at givið ábendingar um, at møguleikarnir fyri trimum stigum í morgin eru góðir. Sjálvandi síggja teir í FSV sær møguleika at vinna í morgin, men teir vísa samstundis á, at VB liðið er rættuliga nógv broytt og styrkt, síðani FSV 29. mai var í Vági.

Sjúrður Ellefsen var ikki við ímóti GÍ, og hann verður heldur ikki við í morgin. Jens Erik Rasmussen noyddist at taka seg aftur eftir eitt korter í Gøtu, og tað var í gjár rættuliga ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla í morgin. Birgir Joensen loysti Jens Erik av, og tað var vorðið sum avloysari. Birgir hevur ikki fingið nógvar møguleikar í ár. Tá ið hann endiliga fekk møguleikan at spæla mesta partin av tíðini, skoraði hann annað málið og legði upp til hitt í javnleikinum í Gøtu. Kim Poulsen hevur ikki vant saman við hinum í vikuni, og tá ið vit tosaðu vestur í Vágar, var tað óvist, um Albert Ari Thomassen verður førur fyri at spæla. Hann lá sjúkur í gjár.

NSÍ-GÍ:

# Grannauppgerð við Løkin



*Tað eru ikki ráð til mistøk av nøkrum slag hjá hvørki NSÍ ella GÍ*

**Runavíkingar hava styrkt um álopspartin, og ætla sær ivaleyst øll stigini. Men gøtumenn eru loksins fullmannaðir, og teir plaga ikki at geva seg yvir í Runavík**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Stóra samrøðuevni í Fótbóltsføroyum fríggjadagin var uttan iva sáttmálin, sum NSÍ hevur gjørt við Karsten From.

Fleiri vóru av teirri áskoðan, at leikarin ikki kann fáa spæliloyvið longu nú, men sum tað framgongur aðra staðni í blaðnum, so verður tað helst so, at hann verður í álopinum hjá NSÍ sunnudagin.

Runavíkingar eru tó nakað skerdir undan dystinum. Jónstein Petersen, sum hevur átt fastan sess á vinstra miðvallarborði fekk sítt triðja gula kort í Gundadali fyri viku síðani, og tí verður hann ikki við á liðnum. Eisini hevur Ian Højgaard drigist við ein eyman lærkrika, men tá vit seinast frættu var kortini væntandi, at hann skuldi vera við sunnudagin.

Og einki er at ivast í, at Runavíkingar nú fara eftir øllum. Tapið fyri HB merkti, at teir nú eru fýra stig aftan fyri oddin, og tí eru neyvan ráð til nakað mistak í seinasu sjey dystunum, um endastøðan skal gerast eitt pláss betri, enn hon var í fjør.

Men tá tað eru gøtumenn, sum vitja við Løkin, so er einki givið. Heldur ikki hóast GÍ higartil í ár ikki hevur staðið seg serliga væl.

Ein stóran part av frágreiðingini fyri hetta eiga eisini allir skaðarnir, ið mest sum hava rapað oman yvir liðið í ár, men nú tykist loksins ein endi vera komin á hesum. Soleiðis er tað bert Krzystof Popczynski, sum tykist ivasamur undan vikuskiftinum, og hartil hevur liðið nú aftur Bartal Eliasen og Henning Jarnskor við, eftir at teir báðir annars vóru leikbannaðir seinasta sunnudag.

Og skulu gøtumenn røkka europeisku plássunum, sum teir hava gjørt á hvørjum ári, síðani føroysk feløg fingu hendan møguleika, so skulu stig á kontina. Helst trý hvørja ferð. Tí sum stigatalvan sær út í løtuni, er tað ikki nóg mikið við eini taptari finalu móti B36, og um árstalsfelagið ikki verður meistari, so verður tað fyri steypasigurin, at teir fara út í Europa.